## Koroma og Holmberg gevast

Framherjin Brima Koroma og miðvallarin Dennis Holmberg vóru í farna kappingarári stuðulsleikarar hjá B36. Men tað verða teir eftir øllum at døma ikki í ár. - Vit vænta ikki at síggja teir aftur í felagnum. Teir fara helst at royna aðrar avbjóðingar, sigur Sigfríður Clementsen, venjari hjá B36. Heini í Skorini og Fróði Clementsen, sum eru uppvaksnir í felagnum, taka hinvegin lut í venjingunum hjá B36 í vetur. Heini í Skorini spældi í seinnu kappingarhálvu í fjør við FC Hoyvík, og Fróði Clementsen hevur seinasta hálva árið verið knýttur at hópinum hjá EB/Streymi.



## Stjørnan vann stórt

StÍF hevði ongan livandi kjans, tá ið tær í gjárkvøldið vitjaðu hjá Stjørnuni í Klaksvík. Oddaliðið í Sunset-deildini vann við 18 málum. Stjørnan legði seg fram um beinanvegin í dystinum, og eftir fyrstu 10 minuttirnar var ikki nakar spenningur í dystinum longur. Í hálvleikinum var Stjørnan frammanfyri 21-10, og klaksvíkskvinnur øktu um munin í seinna hálvleiki. Úrslitið av dystinum var 38-20 til Stjørnan, sum harvið heldur fast um oddaplássið í Sunset-deildini, har Stjørnan kappast við Tjaldur. Stjørnan hevur nú 20 stig fyri 11 dystir. Tjaldur hevur 18 stig fyri 10 dystir.



**Við tilgongdini av Dmitrij Jankovic metir B36-venjarin, at hann hevur fingið spælaran, sum kann stýra verjupartinum hjá liðnum**

# B36 miðar eftir Evropa

**Sigfríður Clementsen skal í komandi kappingarári standa á odda fyri einum hamskiftum B36-liði. Í vetur eru sjey leikarar higartil lagdir afturat hópinum. – Vit hugsa fyrst og fremst um at vinna okkum altjóða luttøku, sigur B36-venjarin**




Uni Holm Johannesen

Bárður Olsen. Símun Joensen. Dmitrij Jankovic. Hjalgrím Elttør. Ingi Højsted. Heini í Skorini.

Eftir eitt miseydnað kappingarár í fjør, tá tað við bit og slit eydnaðist B36 at sleppa undan niðurflyting, eru stórar broytingar farnar fram í leikarahópinum. Seks nýggir leikarar eru lagdir afturat leikarahópinum. Og við Sigfríða Clementsen sum høvuðsvenjara eru greið tekin um, at liðið nú aftur skal mynda oddan í føroyskum fótbólti.

- Vit hugsa fyrst og fremst um at vinna okkum altjóða luttøku. Avbjóðingin verður at spæla nýggju menninar saman sum skjótast, so vit eru til reiðar frá byrjan, sigur Sigfríður Clementsen.

### Jankovic helst avgerandi

Sigfríður Clementsen hevur øll síni venjaraár dúva serliga upp á verjupartin. Ein avgerð sum hevur eydnaðst væl, tí hann hevur vunnið føroyameistaraheitið og steypakappingina við bæði B36 og EB/Streymi. Við B36 var hann eisini fyrsti venjarin, sum hevur vunnið eitt føroyskt lið víðari í altjóða kapping.

Tollaksmessudag var kunngjørt, at verjuleikarin Dmitrij Jankovic aftur skal spæla við B36. Hann átti í 2008 ein av høvuðsleiklutunum, tá hvíta høvuðsstaðarfelagið vann bronsuheiðursmerki og rakk finaluni í kappingini um Løgmanssteypið.

- Eg vænti, at hann verður stýrimaðurin í verjupartinum í ár. Hann hevur prógvað sítt virði í føroyskum fótbólti áður, og eg eri sera fegin um, at hann er tøkur, sigur Sigfríður Clementsen.

### Elttør skal skjóta mál

Nú Brima Koroma eftir øllum at døma ikki heldur fram í B36, hevur Sigfríður Clementsen ongan veruligan framherja at ráða yvir. Hann sigur, at ætlanin er ikki beinleiðis, at Hjalgrím Elttør skal røkja hesa uppgávuna. Men klaksvíkingur skal í øllum førum skjóta mál.

- Nú fáa vit at síggja. Hann plagar at skjóta millum 10 og 12 mál hvørt kappingarár, og tað vænta vit eisini, at hann ger í B36. Um tað so verður sum vongur ella framherji er ikki avgjørt, sigur Sigfríður Clementsen.

Hann vísir á, at Jákup á Borg, Johan Ellingsgaard, Bergur Midjord, Høgni Eysturoy og Christian Mouritsen eisini kunnu røkja uppgávuna sum framherjar, hóast teir vanliga spæla á øðrum plássum.

### Helst tveir afturat

Sambært Sigfríða Clementsen er ikki víst, at B36 ikki fær størri tilgongd í vetur.

- Vit fylgja sjálvsagt við. Er møguleikin fyri leikararum, sum eru áhugaðir og vit meta kunnu styrkja okkum, so vísa vit tí ikki aftur alt fyri eitt, sigur B36-venjarin.

Men Sigfríður Clementsen – er stóra tilgongdin ein treyt, sum tú setti fyri at standa á odda fyri B36?

- Nei. Leiðslan sær fegin, at B36 kappast í oddanum av føroyskum fótbólti. Mín uppgáva verður at standa á odda fyri liðnum, sigur Sigfríður Clementsen.

# Beckham angrar, at hann fór úr United

**Í samrøðu við BBC 5 Live sigur David Beckham, at hann øvundar Ryan Giggs, sum kann enda sína yrkisleið í Manchester United**




Heri Simonsen

Í februar skal David Beckham spæla ímóti sínum fyrrverandi liðfeløgum í Manchester United, tí tá kemur AC Milan á vitjan á Old Trafford, tá liðini skulu spæla 1/8 finalu í Champions League. David Beckham viðgongur nú alment, at hann øvundar Ryan Giggs, som hevur spælt fyri Manchester United alla sína yrkisleið. – Við bretsku útvarpsrásina, BBC 5 Live sigur David Beckham: - Eg hevði elskað at hava verið verandi í Manchester United alla mína yrkisleið, og ikki spælt fyri nakað annað felag, men soleiðis skuldi tað ikki gerast, staðfestir David Beckham.

### Heiðrar Giggs

David Beckham heiðrar sínum gamla liðfelaga, Ryan Giggs: - Tað krevur at verða ein ógvuliga serstakur persónur, og ein ógvuliga serstakur fótbóltsspælari, fyri at kunna spæla í einum fótbóltsfelagi í so mong ár. Ryan (Giggs red.) hevur verið so mong ár í felagnum, at hann kemur at verða ein partur av Manchester United restina av lívinum. Hann er ein ektaður Manchester-drongur, og tað hevur víst seg í verki. David Beckham sigur seg verða ernan av, at hava spælt á sama liði, sum Ryan Giggs. – Eg taki tað sum eina stóra æru at hava spælt á sama liði, sum Ryan Giggs, og gjøgnum hesi árini kom eg at kenna hann, sum persónur og spælari. Ryan hevur alla framgongd, og allan heiður uppiborinan, undirstrikar David Beckham yvirfyri BBC 5 Live.

### Ikki vísur í HM

David Beckham sum skal spæla við AC Milan hetta kappingarárið út, avdúkar at hann kennir seg ikki vísan í, at hann fær eitt pláss í HM-hópinum hjá Fabio Capello, tá enska landsliðið skal til HM-endaspælið í Suður-Afrika komandi summar. – Eg havi ongantíð vænta mær nakað. Eg veit, at eg má spæla nógv, og spæla væl fyri AC Milan. Hetta eri eg til reiðar av. Øll vita, at eg eri til reiðar at arbeiða ógvuliga hart fyri at gerast ein partur av HM-hópinum hjá Onglandi, sigur David Beckham við BBC 5 Live.